# AGA- & ETISKANEVNDIN

**KÆRA 3/2026**

| *FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: Kæra frá KÍ í sambandi við leikbann hjá Halli Hanssyni eftir reytt kort í dysti í Meistaradeildini hjá monnum millum NSÍ og KÍ tann 3. juli 2026** | |
| Deild: Meistaradeildin, menn | Hvør hevur reist málið: KÍ |
| Kapping: Landskapping | Nevndin móttikið kæru: 20. juli |
| Møguligt brot framt: 3. juli | Kærugjald goldið: Ja |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Ja |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | Starvsnevndarummæli: Nei |

**Úrskurður**

Aga- og etiskanevndin hevur avgjørt at staðfesta avgerðina hjá aðalumsitingini hjá FSF um, at Hallur Hansson skal hava 3 dystir leikbann.

**Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli**

Aðalumsitingin hjá FSF hevur í skrivi til KÍ, dagfest 15. juli 2026, boðað frá, at Hallur Hansson fær 3 dystir leikbann fyri at sparka leikara hjá NSÍ. Sambært dómarafrágreiðingini verður leikarin sparkaður, meðan bólturin er í spæl aðrastaðni á vøllinum.

KÍ hevur tann 20. juli 2026 kært avgerðina til Aga- og etiskunevndina. Í kæruni førir KÍ fram, at avgerðin um 3 dystir leikbann er ov hørð og eigur at verða sett niður til 2 dystir leikbann. KÍ metir, at revsingin eigur at verða ásett eftir punkt 3 í Vegleiðing um leikbann og ikki eftir punkt 4.

Í kæruni er ein frágreiðing frá Hallur Hansson, har hann greiður frá, at gerðin verður framd stutt eftir, at ein leikari hevur takklað hann, og tí valdi hann at spenna bein fyri hesum sama leikara. Talan var á ongan hátt um grovan harðskap og tískil er tað óskiljandi, at tað verður givið 3 dystir leikbann í staðin fyri 2. Serliga skal vísast á, at dómarin sjálvur sær ikki hendingina og tískil er tað linjuverjin, sum tekur avgerðina. Hallur metir harumframt, at sýnið hjá linjuverjanum í støðuni ikki er nøktandi. Leikarin hjá NSÍ er skjótur á føtur aftur og spælir víðari, og metir Hallur ikki leikarin hjá NSÍ hevur fingið nakað mein.

Aga- og etiskanevndin hevur frá umsitingini hjá FSF fingið sent sjónvarpsupptøku frá Televarpinum av hendingini.

**Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Vísandi til grein 2, 3 og 5 í aga- og etisku reglugerðini hjá FSF, hevur Aganevndin málsføri at viðgera hetta mál.

**Fakta í málinum**

Sambært dómarafrágreiðingini fær Hallur Hansson reytt kort fyri at sparka leikara hjá NSÍ, meðan spælt verður aðrastaðni á vøllinum. Harumframt stendur í dómarafrágreiðingini, at bólturin ikki var í nánd, tá ið hendingin fór fram.

Tað framgongur ikki nærri útgreinað í dómarafrágreiðingini, um tað var dómarin ella linjuverjin, ið sá sjálvan tilburðin. Dómarafrágreiðingin er tó greið um, at talan var um spark.

Hallur Hansson greiðir í partshoyringini frá, at hann eftir at verða takklaður, velur at spenna bein fyri hesum sama leikara.

KÍ hevur, eftir at kæran varð latin Aga- og etiskunevndini, eisini fingið sjónvarpsupptøkuna frá Televarpinum, ið vísir hendingina, til hoyringar og hevur sent inn hoyringssvar. KÍ viðmerkir í sínum hoyringssvari m.a., at beint áðrenn støðuna, har Hallur sparkar út eftir NSÍ leikaranum, hevur NSÍ leikarin takklað Hallur ógvusligt. Tað er tí ikki rætt, at Hallur ikki er ertaður. KÍ metir ikki, at Hallur rakar leikaran og vísir á, at royndin at sparka, ikki er ógvuslig.

**Lógarverkið**

Sambært § 6 í Aga- og etiskureglugerðini hevur Aga- og etiskanevndin heimild at geva leikbann til persónar, sum fremja brot á lógir og reglur hjá FSF, UEFA og FIFA.

Onnur viðkomandi lóggáva í hesum máli er Kappingarreglugerðin og Vegleiðing um leikbann.

Víst verður eisini til art. 39 og art. 40 í FIFA Disciplinary Code, sum heimilar Aga- og etiskunevndini at viga øll prógv og gevur frágreiðingum frá dystarleiðarum serligt próvvirði.

**Staðfestingar, metingar og niðurstøða**

Í 2a (Fair Play) í kappingarreglunum stendur:
"Øll sum á ein ella annan hátt taka lut í føroyskum fótbólti og kappingum undir FSF skulu vísa virðing, integritet og góðan ítróttaranda í samsvari við meginreglurnar um fair play.
Gerðir, ið við vilja skaða integritetin í fótbóltsspælinum, eru bannaðar og kunnu hava við sær revsing."

Í § 37 í kappingarreglunum stendur:
"Heimilað verður Kappingarnevndini at áseta nærri reglur um leikbann av leikarum, venjarum og leiðarum, um útvísing ella burturvísing í kapping ella dysti í og uttan fyri Føroyar, um óhøviskan atburð ella málburð í samband við dyst, venjing ella venjingardyst."

Sambært vegleiðingini um leikbann, sum er samtykt av Kappingarnevndini 18. februar 2022, verður leikbann á 2 dystir (punkt 3) givið fyri eitt sindur grovari brot, sum m.a.:

- "fyri roynd at sparka ella sláa um bólturin ikki er í spæli, ella um spælið fyrigongur aðrastaðni á vøllinum,
- fyri harðligan atburð mótvegis við- ella mótstøðuleikara."

Leikbann á 3 dystir (punkt 4) verður givið fyri grov brot sum m.a.:

- "at sparka ella sláa, um bólturin ikki er í spæli, ella um spælið fer fram aðrastaðni á vøllinum."

# AGA- & ETISKANEVNDIN

Aga- og etiskanevndin hevur gjøgnumgingið tilfarið í málinum, undir hesum avgerðina hjá Aðalumsitingini hjá FSF, kæruna frá KÍ, dómarafrágreiðingina, sjónvarpsupptøkuna av hendingini og hoyringssvarið frá KÍ.

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at sambært art. 40 í FIFA Disciplinary Code frá mai 2026 hava frágreiðingar um fakta frá dystarleiðarum, serligt prófvast virði. Høvi er at bera fram mótprógv hesum viðvíkjandi. Sambært art. 39 í FIFA Disciplinary Code stendur tað Aga- og etiskunevndini frítt at meta um prógvini í málinum.

Eftir eina gjøgnumgongd av málinum, herundir sjónvarpsupptøkuni av hendingini og hoyringssvarinum hjá KÍ, metir nevndin ikki, at nóg greitt grundarlag er fyri at leggja annað fakta til grund enn tað, sum er lýst í dómarafrágreiðingini.

Aga- og etiskanevndin metir ikki, at sjónvarpsupptøkurnar stuðla undir uppáhaldið frá Hallur Hansson um, at hann spennir bein fyri leikaranum hjá NSÍ, eftir at hann sjálvur er takklaður av sama leikara, ella uppáhaldið frá KÍ um, at Hallur ikki rakar leikaran og at royndin at sparka ikki er ógvuslig.

Vísandi til dómarafrágreiðingina, so leggur Aga- og etiskanevndin til grund, at Hallur Hansson hevur sparkað leikara hjá NSÍ, meðan spælið fer fram aðrastaðni á vøllinum, og at málið tí eigur at verða viðgjørt eftir punkt 4 í Vegleiðing um leikbann.

Við heimild í § 6, nr. 3 (fyri persónar) í Aga- og etiskureglugerðini og vísandi til vegleiðingina um leikbann, art. 39 og 40 í FIFA Disciplinary Code og til siðvenju, er Aga- og etiskanevndin eftir einari samlaðari meting komin til ta niðurstøðu, at Hallur Hansson skal hava 3 dystir leikbann fyri at sparka leikara hjá NSÍ, meðan bólturin er í spæli aðrastaðni á vøllinum.

**Kæruvegleiðing**

Sambært grein 10 í Aga- og etiskureglugerðini kann henda avgerð ikki kærast til Yvirkærunevndina.

**Staður, dagfesting og undirskrift:**

**Tórshavn 1. august 2026**

Anni á Hædd

**Anni á Hædd**

Í Aga- og etiskunevndini eru: Eli Thorsteinsson, formaður og løgfrøðingur, Ken Nónklett, varaformaður og løgfrøðingur, Anni á Hædd, løgfrøðingur, Jóhan T. Davidsen, løgfrøðingur og Birita S. Samuelsen, løgfrøðingur.

Í hesum málið hava luttikið Anni á Hædd, sum virkandi forkvinna, Jóhan Troest Davidsen og Birita S. Samuelsen.

Eli Thorsteinsson og Ken Nónklett hava ikki tikið lut í viðgerðini.